gult cyan magenta svart

Garry Kasparov á tíðindafundi í Sparikassanum týsdagin
Myndir: Jens Kristian Vang

nevndin setti sær fyri var at leggja eina ætlan fyri føroyska telving komandi árini. Endmálið var at skapa eitt altjóða gjøgnumbrot. T.v.s. at onkur full blóðs føroyingur skal skora IM tittulin (altjóða meistaratittulin). GM tittulin (stórmeistaratittulin) tordi vit hóast alt ikki at taka uppá tunguna.

Í hesum arbeiðinum skeyt eg upp, at vit skuldu fáa Kasparov á vitjan í Føroyum. Um ikki annað so til tess at prógva, at vit kunna! At vit megna at bróta mentala stongsulin, sum alt ov leingi hevur hindrað føroyingum í at trúgva nóg nógv uppá seg sjálvar. Um tað kundi eydnast, so kann so mangt eydnast.

Kasparov skuldi til Íslands, vistu vit. So nevndin í TSF sendi meg ein fríggjadag í apríl mánaði í fjør á Íslandsferð at fáa fatur á legenduni. Mánadagin eftir hevði eg heilsað uppá heimsmeistaran og tosað væl og leingi við umboðsmannin hjá honum, tann fyrrverandi yrkis tennisleikarin, Owen Williams.

Hóast Føroyar eru at rokna sum ein mikrostátur og tí av avmarkaðum týdningi fyri ein heimsmeistara, sum allur heimurin konstant bjóðar innar, valdi Kasparov at koma allan vegin úr Moskva og 14 mánaðir seinni lendi meistarin í Føroyum.

Brádliga var tað ‘næstan óhugsandi’ veruleiki. Og mitt í støðuni tyktist alt so leikandi lætt og líkatil. Tað bar til!

Fullveldið skal hava ein stórmeistara!

Vit eru lidnir at eta og eru komnir fram til, at um Føroyar skulu hava fullveldi, skulu tær eisini hava fyrsta stórmeistaran í talvi. Tað er rætti málsetningurin. Vilja vit fullveldi, skulu vit eisini markera okkum á líknandi hátt á talvøkinum.

Vit tosa um, at innan fimm ár eru liðin skal okkara altjóða gjøgnumbrot materialiserast í einum reint føroyskum stórmeistara tittuli. Vegurin frameftir er at fáa fram teir unglingar, sum møguliga hava hetta í sær. Tá vit eru komin hartil, lovar Garry at hjálpa okkum. Hann kann vísa á góðar venjarar og heita á teir um at átaka sær venjarauppgávur í Føroyum.

Og á hendan hátt skulu teir evnaríkastu unglingarnir venjast og luttaka í altjóða kappingum úti og heima. The hard way is the only way.

Tað gav mær nakað at hugsa um, at Garry soleiðis bjóðar seg fram at stuðla okkum oyggjabúgvum.

Meiri kvalifiseraðan stuðul kunnu vit so ikki finna aðrastaðni. Professionalisma merkir hendan mannin allan vegin í gjøgnum. Tað fer sanniliga at seta stór krøv til okkum sjálvi í TSF at fara í samstarv við heimsins besta telvara nakraníð.

Faroe Islands?

– Tað er fyrstu ferð, familjan hjá mær ikki visti, hvar eg skuldi, sigur hann brádliga og flennir.

– Tá vit leitaðu eftir Føroyum á kortinum, kundu vit rætt og slætt ikki finna tað nakrastaðni…

Garry býr sentralt í Moskva millum 10 mió. aðrar moskvovittar. Landið uttan um Moskva er eisini heimsins størsta land við umleið 16 mió. ferkilometrum.

Tá pallurin hjá hesi heimstjørnu samstundis eru metropolarnir um allan heim, var tað møguliga hann, sum fekk størsta mentannarskelkin, tá hann lendi í einum landi, sum hann enn ikki fann á nøkrum landakorti, og har samlaða íbúgvatalið liggur nøkulunda á leið við gøtuna í Moskva, har stóru húsini hjá honum liggja.

Kongurin koppaður og tó..

Tá vit seinnu spáka ein túr í Havnargøtum fellur prátið inn á einasta persónin, sum Garry hevur veruliga respekt fyri: Vladimir Kramnik.

Kramnik gjørdi tað, sum eingin hevur megnað í 15 ár. Hann niðurtelvaði Garry í oktober í fjør og tók HM tittulin frá honum. Kramnik er vítt og breitt viðurkendur sum heimsmeistari, ikki minst av Garry sjálvum.

Júst her vísir hann eina nýggja síðu við sær sjálvum. Tá tað ræður um telving á so høgum støði og at halda teg á toppinum í so nógv ár er ikki pláss til órealistiskar sjálvsmetingar. Tú mást vita presist, hvat tú dugir til og hava nóg nógv sjálvsálit at kunna geva tað besta hvørja ferð. Logiski sansurin má vera árvakin alla tíðina.

Hetta er tað, sum summi miskilja sum ‘stórheitsvanvid’, hóast tað tvørturímóti er ein avgerandi fortreyt.

Og tá Garry førir fram, at ein nýggjur dystir millum seg og Kramnik er alneyðugir, um heimsmeistaraheitið ikki skal missa tign, so hevur hann púra rætt. Heimsmeistarin er altíð tann besti telvarin. Og besti telvarin má altíð bjóða tí besta avbjóðaranum av. Bert soleiðis kann man finna og útnevna rætta heimsmeistaran.

Í løtuni eitur hann Kramnik. Men um hann ikki telvar móti Garry Kasparov áðrenn 2002 fer at halla, fer heimsmeistaraheitið at missa sín týdning.

Tey flestu hugsa tað. Tey flestu ynskja tað. Tí tey allarflestu bíða eftir tí eina manninum, sum kann sameina telvingina undir ein heimsmeistaratittul aftur.

Tá eg eftir nakrar sera stravnar dagar beyð Garry Kasparov góða heimferð á flogvøllinum, var eg mest av øllum glaðastur fyri at vera komin at kenna mannin aftan fyri legenduna.

Garry fór ikki einans avstað við 29 av 31 møguligum stigum. Eg haldi eisini, hann fór avstað við einum stórum parti av tí iva, sum annars kundi hindrað Talvsambandi Føroya at skapt tað altjóða gjøgnumbrotið, sum vit so inniliga tráa eftir.

Eg sat tí við eini undarligari kenslu av ‘tíðini áðrenn og aftan á Garry Kasparov’, meðan eg hugsunarsamur koyrdi aftur til

Rani Nolsøe eftir at hava koyrt Kasparov á flogvøllin: – Eg sat tí við eini undarligari kenslu av ‘tíðini áðrenn og aftan á Garry Kasparov’, meðan eg hugsunarsamur koyrdi aftur til Oyragjáar



Bilaseljari søkist.

Søkt verður eftir sølufólki / leiðara til bilasøludeildina.
Uppgávan er spennandi og lønina tosa vit um.
Spyr eftir Ludvík

Bilfríðkan

Smiðjugerði • 100 Tórshavn • Tel. 31 73 00 • Fax 31 11 58 • www.bilfridkan.fo

Bilfríðkan er ein serverkstaður við 25 ára royndum, ið umboðar BMW og FIAT.
Umframt sølu gera vit allar skaðaumvælingar og lakering.

petur & petur • 320870

gult cyan magenta svart

Mentamálastýrið

Stjóri til Sjónvarp Føroya

ar

Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum stjóri í Sjónvarpi Føroya er leyst at søkja.

Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Mentamálastýrinum.

Høvuðsuppgávurnar hjá Sjónvarpi Føroya eru m.a.:

- Mótvegis borgarunum at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald
- Í programmvirkseminum at leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi og sakliga og óhefta upplýsing
- At veita eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga

Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av stovninum. Stjórin setir starvsfólk og loysir fólk úr starvi, og stjórin hevur fyristinginarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum mótvegis landsstýrismanninum.

Sjónvarp Føroya og alt fjølmiðlaøkið stendur yvir fyri stórum broytingum og avbjóðingum, og tí er umráðandi, at stjórin megnar at fáa stovnin at ríða á aldukambinum.

r e kakr

Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava

- Útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Evni at sameina tað mennandi og tað fíggjarliga
- Kunnleika til føroyska mentan og føroyskt mentanarlív
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við aðrar stovnar o.o.
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum
- Evni at menna SvF til ein týðandi mentanarstovn

b a

Sjónvarp Føroya mennist alsamt, og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti og samstarvi inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarvi.

Arbeiðið er á høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

e anar nar re r

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá Tænastumannafelagi Landsins, tó uttan at vera eitt tænstumannastarv. Harumframt verður veitt eitt eftirlønargjald uppá 15%. Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um. Tann setti skal kunna góðtaka broytingar í starvinum orsakað av møguligum komandi bygnaðarbroytingum.

kn

Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
tlf. 35 50 50, faks 35 50 55, t-postur: mms@mms.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. juni 2001. Starvið verður sett frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra, ella Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra í Mentamálastýrinum, á tlf. 35 50 50.

Men a a r *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
n ar r a *er, sum nú er, býtt uppí 5 deildir. Í Sjónvarpi Føroya starvast 50 fólk. Rakstrarætlan Sjónvarpsins er uml. 23,5 mió. kr. fýri fíggjarárið 2001.*

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Starvslesandi í Brússel
(Stagiaire)

Søkt verður eftir lesandi til Sendistovu Føroya í Evropasamveldinum. Starvstíðin er sett til at verða frá 1. september 2001 til 1. februar 2002 ella fyri lestrarhálvárið.

Uppgávur
Tann, ið settur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á sendistovuni í samskiftinum við Evropasamveldið við serligum atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

Førleikakrøv
Tann, ið settur verður, eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á bachelor stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

Starvsstaðið
Starvsstaðið er Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Brússel, sum er ein samrunnin partur av Løgmansskrivstovuni - uttanlandsdeildini.

Setanartreytir
Starvið verður skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum. Starvið er ólønt. Tó verður veittur ókeypis bústaður.

Nærri upplýsingar eru at fáa við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra, tlf. +298 35 10 10.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum verða at senda

Løgmansskrivstovuni
Tinganes - Postsmoga 64
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefax +298 35 10 15 E-mail: lms@fl.fo

og skulu verða á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi mánadagin 2. juli 2001.

an kr an *er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær eindir.* ***an an e n*** *hevur ábyrgdina av uttanlandsmálum, heruppií ES málum, millumtjóða samráðingum, norðurlandamálum, samráðingum við donsku stjórnina og protokol.*

KIA CARNIVAL

2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.

D. B. Bilar
Tel. 310 600

Sosialurin - 311820

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Feria

Vegna feriu hava vit stongt frá 22. juni til 9. juli.

Salong Sølva
900 Vágur
Tlf. 374415